## VIÐMERKINGAR

# Elendigt, Føroya Tele

**Jón Ellendersen**
*telduvitan.com*



Vit hava lagt nógva orku og nógvan kapital í at fáa heimasíðu okkara, Telduvitan.com at koyra sum ta fyrstu og størstu føroysku heimasíðuna um og úr teldu-heiminum. Men okkara størsti fíggindi hevur verið Føroya Tele og tað alt ov vánaliga DSL-netið.

Hóast FT reklamerar við, at DSL-sambandið skal eitast at koyra við 2Mbit, so uppliva vit so at siga hvønn einasta dag, at sambandið ikki koyrir við meiri enn 0,25Mbit og hetta hevur við sær, at vit støðugt verða stongdir úti frá servaranum. Men hetta er ikki alt! Samstundis missa vit hópin av tilfari, tí servarin læsir uttan ávaring mitt í eini process og orsøkin: Vánaliga sambandið!

Vit hava vent okkum til ein av teimum kanska frægastu serfrøðingunum í Norðanlondum, stjórin á ComputerSweden, sum er ein partur av IDG og hansara svar er ógvuliga greitt:

- Koyra tit við kopari, so ber yvirhøvur ikki til at "levera vøruna" tí koparið megnar ikki at rúma allari ferðsluni. Kopar er avoldað!

Hetta hava vit tíanverri sannað, og tískil noyðast vit at fara ígjøgnum eina størri umlegging av heimasíðuni so hon kann koyra, hóast vit bert hava einar tveir tímar um samdøgrið, har vit kunnu dagføra síðuna.

Telduvitan hevur mált ferðina í fleiri vikur, so dokumentatiónin er í lagi. Men Føroya Tele hevur higartil ikki viljað tikið ábyrgd av hesum.

Hetta er ein stór skomm og hon gerst ikki minni av, at vit gjalda fyri 100% av tí, vit bert síggja 25-40% av, nevniliga ferðini á breiðbandinum.

Tað tykist okkum løgið, at ein almennur stovnur kann sleppa at snýta kundarnar fyri so stórar peningaupphæddir, sum talan er um her. Men sum er fáa vit ikki gjørt annað enn at umleggja heimasíðuna so hon kann koyra við eini dagligari dagføring, sum er innanfyri teir max 2 tímarnar. Nær teir eru, er altíð óvist og tað er heldur ikki vist, at vit yvirhøvur fáa so frægt av ferð, at tað letur seg gera.

Umberingarnar frá Føroya Tele eru mangar, men so at siga allar byggja á, at tað er útgerðin hjá okkum, tað er galið við. Løgið tá vit hugsa, at øll útgerðin er frá Føroya Tele.

# Er stættastríðið av

**Johan Carl Dam**



Vit frætta frá landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum, at løgmaður sigur stættarstríðið at vera fiktivt og endaliga avgreitt. Neyvan eru øll samd við løgmanni í hesum, og undirritaði veit í hvussu er, at stættarmunurin er ikki horvin, nei, hann er bara vaksandi.

Hygg bara eftir, hvussu myndugleikarnir blíva við við at geva teimum ríku og taka frá teimum fátæku. Í so máta mugu vit siga, at løgmaðurin roynist sum ein øvugtur Robin Hood. Skattalættin er eitt dømi, har bara tey vælbjargaðu fáa burturúr. Síðan er alt tað, sum nú verður flutt út til kommunur at umsita. Tað ger, at vit skulu gjalda fyri hesar tænastur gjøgnum kommunuskattin ístaðin fyri gjøgnum landsskattin. Kommunuskatturin er, upp á seg, nógv dýrari fyri tey, sum tjena í minna lagi. Tí er tað, at flyta tænastur út á kommunurnar, lutvís dýrari fyri arbeiðaralønina enn stjóralønina.

Annars dýrka allar vørur og ikki bara oljan. Og hava lægru lønirnar tí meira enn ilt við at gjalda dagligar rokningar. Tá vit so umframt mest sum dagliga fáa skriv frá tryggingini um, at allir tryggingarprísir eru farnir til himmals. Eitt nú kostar tað næstan 1800 krónur árliga at tryggja eitt prutl, umframt skal sami tryggingartakari gjalda 3.000 krónur í sjálvsábyrgd. Tvs at ein skaði á prutlið skal fara upp um 5.000 krónur, áðrenn tryggingartakarin fær nakað afturgoldið. Biltryggingin dýrkarsomuleiðis, húsatryggingin eisini. Eg haldi tað vera ótrúligt, at tryggingin skal sleppa at eyðræna fólk soleiðis. Men kanska skulu markleysu íløgur teirra fíggjast av okkum eisini. Og fyri at tað ikki skal vera lygn, so kemur landsstýrið eisini við einari fúlari eykarokning upp á vegskatt.

Nú verður so nógv rópt upp um, at vit skulu vera nøgd allíkavæl, tí gjaldið til samhaldsfasta er sett upp við einum kvartum prosenti. Tað er sjálvsagt at fegnast um, at okkara pensionistar fáa nøkur oyru afturat. Ja, kanska eru eini pensionistahjún í fleiri førum betri stillað enn hjún, við lágum inntøkum. Samhaldsfasti er í fínasta lagi, men hann hjálpir ikki teimum lægru løntu á nakran hátt í teirra dagliga stríði. Samhaldsfasti hjálpir ikki eitt vet upp á keypiorkuna hjá einum láglóntum.

Kanska er einki stríð millum stættir longur, men stættamunurin er øgiligur og vaksandi. Kemur ikki vend í og tað skjótt, so kann væl verða at vit fáa eitt stættastríð, sum vit ongan tíð hava upplivað áður.

Lummarnir hjá teimum lægri løntu eru fyri langari tíð síðan tómir, bankarnir vilja bara hjálpa, har tað loysir seg, og tá myndugleikarnir ikki tykjast hava hugflog til at fara eftir øðrum enn lægstu lønunum, ja, so kann alt bara enda í ruðuleika.

Hetta verður okkum av sonnum ein dýr og vanlukkulig 0-loysn. Tað eru ikki nógvar rokningar, ein kann gjalda við 0 krónum.

# Áheitan á landsstýrið og løgtingið

**- at hækka fyritíðarpensiónirnar í Føroyum**

Viðvíkjandi løgtingsmálið nr. 13/2005: Uppskot til samtykar um broyting í løgtingslóg um almannapensiónir o.a.

Í løgtingsmáli 13/2005 verður uppskot sett fram, har mælt verður til at taka av lægstu fyritíðarpensión - hetta soleiðis at tey, sum í dag fáa lægstu fyritíðarpensión, fara at fáa játtað tað, sum í dag samsvarar við miðal fyritíðarpensión.

Upphæddirnar, ið verða veittar fólki við skerdum arbeiðsførleika og avlamnum, ið fáa lægstu fyritíðarpensiónir, eru alt ov lágar. Gift fáa 5.069 kr. um mánaðin ella í alt 60.828 kr. um árið, og støk fáa 6.363 kr. um mánaðin ella í alt 76.356 kr. um árið.

Feløgini gera við hesum vart við, at tað er alneyðugt - uttan meira drál - at hækka lægstu fyritíðarpensión, soleiðis at henda pensión í minsta lagi kemur upp á tað, sum svarar til miðal fyritíðarpensión, har gift, anno 2005 fáa 90.228 kr. - og støk fáa 104.724 kr. í árligari pensión.

Feløgini fara við hesum somuleiðis at gera vart við, at avlamnis- ell fyritíðar pensión er ein samsýning fyri mist arbeiðsevni, og fara vit tí við hesum at heita á landsstýrið og løgtingið um at veita giftum og støkum somu grunduppphædd, soleiðis sum gjørt verður í londunum uttan um okkum.

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Almanna- og heilsurøktarafelagið**
**Føroya Pedagogfelag**
**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**
**Heilsuhjálparafelag Føroya**
**Havnar Arbeiðsmannafelag**
**Ergoterapeutfelagið**
**Føroya Psykiatrifelag**
**Magistarafelag Føroya**
**Fysioterapeutfelag Føroya**
**Fakfelag Sjómansskúlalærara í Føroyum**
**Føroya Musikklærarafelag**
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**
**Starvsmannafelagið**
**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**
**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag**
**Fiskimannafelag Føroya**
**S&K - felagið**
**Bioanalytikarafelagið**
**Økonomafelag Føroya**
**Ljósmøðrafelag Føroya**
**Føroya Handverkarafelag**
**Felagið Maskinmeistaralærara**
**Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara**
**Føroya Lærarafelag**
**Postverk Føroya**
**Maskinmeistarafelagið**

# Vanvirðing av Bíbliuni í løgtinginum

**Svenning av Lofti**

Í samband við viðgerðina av lógaruppskotinum viðvíkjandi samkyndum, ið varð viðgjørt í løgtinginum fríggjadagin, var sárt at hoyra teir báðar uppskotsstillararnar, Finnur Helmsdal og Anitu á Fríðriksmørk sáa iva um trúvirði Bíbliunnar. Sagt varð t.d. at Bíblian mótsegði sær sjálvari í mangastaðni. Ja, mangt verður í neyðini nýtt tá ið grundgevingar



tróta og ein sær tap í hendi – eisini ómansligt leysakast sum hetta. álopið á trúvirði Bíbliunnar. Hetta avdúkar hvør veruligi andin er aftan fyri hetta uppskotið.

Hetta er fyrstu ferð eg nakrantíð havi hoyrt beinleiðis álop á Guds orð, Bíbliuna, á tingsins røðarapalli, ta bók, sum allarflestu føroyingar virða og æra og líta á í lívi og deyða.

Hetta álop á Bíbliuna kom av, at gudsóttandi og djarvir tingmenn peikaðu á at Bíblian greitt talaði ímóti samkyndum samlívi, og at teir vildu virka fyri, at uppskotið ikki varð samtykt.

Tøkk til tykkum løgtingslimir, ið stríddust manniliga móti hesum uppskoti hendan fríggjadagin.

Haldið á í stríðnum!

